## VIÐMERKINGAR

# Flúgvandi málrøkt

EYÐUN Á BORG
Lærari



**Atlantsflog, ikki Atlantic Airways!
(Flogterna, flogsveinur og einskiljing)**

Atlantsflog: Í Føroyum eiga vit at brúka føroyska heitið, Atlantsflog! Uttanlands kunnu vit so brúka enska heitið, Atlantic Airways!

Annars fari eg at ynskja Atlantsflog(i) blíðan byr! Tit (vit) vunnu á útlendskum stórkapitali. Til lukku við tí!

Flogterna: Ikki stjúardessa, men flogterna! Gevið gætur! Tað úttalast terna, ikki tedna! Í kvæðamáli er ein terna ein tænastugenta.

Flogsveinur: Havi hoyrt onkustaðni, at maðurin, stjúardurin, eitur flogsveinur á føroyskum!?! Snøgt orð!

Einskiljing: Gott orð, tá tú hevur vant teg við tað! Privat (latín) merkir nakað sum: at skilja frá tí almenna og lata tí einstaka!

Góðu myndugleikar! Einskiljið ikki okkara høvuðsfarleið til umheimin á útlendskar hendur! Verið varnir! Ups, politisk málrøkt!

Faroe Jet: Nýggja føroyska flogfelagnum fari eg eisini at ynskja blíðan byr; men gott í tykkum: Fáið tykkum eisini eitt føroyskt navn til nýtslu í Føroyum!

Við háfloygdari málkvøðu

*eydun.a.borg@skulin.fo*

# Føroyskt tolsemi

SÁMAL PETUR Í GRUND
Fyrrverandi landsstýrismaður



**Meiningar og holdningar í kjalarvørrinum av kynsrelateraðu umrøðuni**

Í umrøðuni av korum, ella manglandi korum, hjá teimum sum víkja frá tí normala á kynsliga økjinum, er ymiskt knýtt uppí, sum á sama hátt er egnað til umrøðu.

Tað mest syrgiliga í umrøðuni higartil, er uttan iva tað, at persónur av øðrum uppruna enn føroyskum, misfór og framvegis misfer Merkið á ein syndarligan hátt.

Útvarpssendingin »fimmarin« hevur longu umrøtt talufrælsið, sum er eitt sera áhugavert evni í kjalarvørrinum av omanfyrinevndu umrøðu.

Eitt annað evni sum í hesi umrøðu er sera viðkomandi er tolsemi.

**Tolsemi. (toleranca)**

Bólkurin 200 við síni melding av sóknarprestinum Mogens T. Christensen, vísti eitt dømi upp á manglandi tolsemi. Kanska enntá ekstremt manglandi tolsemi. Hetta er galdandi, hóast hetta var ein roynd at útnytta kjakið til teirra egna fordeil.

Bill Justinussen kann ikki leggjast undir manglandi tolsemi í sama mun, hóast hann mælti fútanum at taka flaggdálkanina hjá Ole Wich til viðgerðar.

Hansara átak var ikki so víðgongt sum átakið hjá bólkinum 200, harumframt var átak hansara ein beinleiðis fylgja av provokatiónini frá teim fyrrnevndu.

Kundi tikið fleiri dømi, men haldi ikki at tey kasta so nógv ljós á hetta evnið at tað er neyðugt, men eri samdur við Finni Helmsdal í hansara vurdering av umrøðuni.

Hvat er tolsemi so? Jú, tað er millum annað, tað at vit kunnu liva lið um lið í sátt og semju, hóast vit eru ymisk og hava ymiskar holdningar.

Um hetta er allur sannleikin um tolsemi. Ella sagt vi øðrum orðum; at tað ikki letur seg gera at beskriva tolsemi ørðvísi, skal eg als ikki pástanda.

**Tolsemi og holdningar**

Eitt sum mangan ger seg galdandi, bæði í umrøðu manna millum og í umrøðu í fjølmiðlunum, er ein samantvinnan av hugtøkunum holdningar og tolsemi.

Samantvinningin sær út til at hava eina rót í tí, at hevur ein kristiligar holdningar, so er ein intolerantur, meðan tolsemi fylgir við tí at vera liberalur ella sekulariseraður.

Hesin hugburður er langt av leið. Tað nærmasta hesin hugburður kemur sannleikanum, er tann sannroynd, at millum tey fólk sum vísa manglandi tolsemi eisini eru fólk sum hava sterkar holdningar.

Men manglandi tolsemi hongur ikki uppií tí at hava holdningar og meiningar til lívsins viðurskifti. Heldur er tað soleiðis, at fólk eru meira og minni tolin. Ella sagt meira beinleiðis, tað vilja altíð vera menniskju sum eru ekstrem.

Manglandi tolsemi kemur harumframt mangan av manglandi upplýsing um tingini.

Manglandi tolsemi kann eisini skyldast ótta.

Men eisini fólk sum kalla seg upplýst kunnu vísa skelkandi mangul uppá tolsemi.

Men lat tað vera sligið fast, at tað at hava holdningar og manglandi tolsemi er ikki eitt og tað sama.

**Føroyska tolsemi**

Tað hevur verið ført fram í dagsaktuellu umrøðuni, at vit í Føroyum vísa manglandi tolsemi.

Hetta meini eg als ikki er rætt. Føroyar er eitt tað landið í vesturheiminum sum í størstan mun hevur varðveitt kristnu hugsjónina í verki og talu.

Lat meg so siga alt fyri eitt, at harvið er tað ikki sagt, at ikki onkrar ónollir hanga við her og der. Tað vil tað vist altíð koma at gera í alla tað tíð vit tosa um menniskju.

Kristna hugsjónin er ikki snævur tá tað snýr seg um tolsemi. Kærleiksboðið í skriftini og Jesu tala um kærleikans týdning, eigur at skúgva allan iva um hetta til viks.

Og í Føroyum liva fólk lið um lið í sátt og semju, uttan at spyrja grannar og bygdafólk, hvat teirra seksuella orientering er.

Hygg rundanum okkum. Eru Føroyar ikki í nógv størri mun enn hini londini í vesturheiminum spard fyri kriminalitet, bardagar og familierar sorgarleikir?

Vit kunnu, uttan at himprast, ganga hvar í landinum vit vilja allar tíðir á døgninum.

Eitt annað dagsaktuelt dømi sum vísir hvussu stórt føroyska tolsemi er, er hetta:

Tað letur seg gera hjá persóni, – av øðrum uppruna enn føroyskum, – at heingja okkum út sum fólk, og enntá at brúka okkara egna tjóðareyðkenni til tess, og framvegis ganga ekkaleysur mitt okkara millum.

Sami persónur kann so loyva sær, eftir at hava gjørt hesa níðingsgerð, at uppføra seg sum gíslatakari og diktera okkum hvordan og hvorledes.

Les bara Dimmalætting frá tískvøldinum 17.januar. (de homoseksuelle og den færøske historie). citat: ”Der skal sendes nogle klare signaler, der indikerer, at de er accepteret som en del af den færøske kulturarv og accepteret i nutidens og fremtidens samfund.” citat slut.

Hetta er ein partur av loysipeninginum fyri at loysa sløjfuna av kunstprojekti hansara.

Hvar aðrastaðnis í verðini er tolsemi so stórt, at hetta kundi latið seg gjørt?

Onga aðrastaðnis hevði ein tílíkur persónur kunna gingið ekkaleysur runt ímillum fólkið!

**Den færøske kulturarv**

Føroyski mentunnararvurin hevur ongar trupulleikar at viðurkenna sær føroyska fólkið, soleiðis sum tað er skapt.

Eins og í øllum øðrum mentanum er tað soleiðis, at ymiskt er hvussu stolt fólkið er av tíðarskeiðum og góðsinum í mentanararvinum, men kennast við hann, tað hava vit ongar trupulleikar av.

Haldi ikki at føroyski mentanararvurin inniheldur minni tolsemi mótvegis ørðvísi-hugsandi, enn mentanararvurin í grannatjóðum okkara ger tað.

Her á landi hava til dømis ongantíð brent heksir á báli, soleiðis sum tað hevur verið gjørt í grannatjóðum okkara.

Nei okkara fólk nýtist ikki at skammast við mentanararv okkara, tvørturímóti eru vit stolt av at vera ”føroyingar serstøk tjóð”.

Tað serstaka við tjóð okkara hevur í øllum førum í nýggjari tíð verið at vit eru gestablíð og hava stórt tolsemi.

**Framtíðarsamfelagið**

At spáa um framtíðina hevur altíð verið trupult.

Tað er tó einki sum helst sum tíðir uppá, at føroyska framtíðarsamfelagið ikki skal góðtaka mennsikju sum tey eru.

Og helst verður tað eisini pláss fyri, at á vís fólk fara at rópa upp um, at tað ikki verður lagt nokk merki til teirra.

Okkara samfelag kemur helst eisini at kunna hýsa teimum norðurlendingum, sum hóast tey eru av øðrum uppruna, koma til tað niðurstøðu, at í Føroyum er betri at vera, enn í tí landi sum tey vóru fødd.

Vit hava heldur ikki nakra føroyska tíðing av útlendska orðafellinum: ”skik følge, eller land fly.”

So, alt í alt, so sær tað slettis ikki so svart út.

*spg@post.olivant.fo*

# Hvat er ein listarmaður?

BILL JUSTINUSSEN
Løgtingsmaður



**Ein kendur havnamaður ringdi til mín nú um dagarnar og greiddi frá, at hann einaferð spurdi Ingálv av Reyni, sála, hvat ein listarmaður er. Eftir eina hugsunarløtu svaraði Ingálvur í sínum sermerkta eyðmjúkleika: »Tað er ein, sum hevur málað EIN góðan málning – kanska tveir«**

Sostatt feldi hesin viðurkendi listarmaðurin fyrst og fremst dóm yvir síni egnu listaverk, og í sama viðbragdi lyfti hann listina upp í hæddirnar. Hann dømdi listina hart júst fyri at geva henni sítt sanna virði. List er list, tí hon ber av tí vanliga, tí, sum øll kunnu avrika. Listarfólk eru úrmælingar, sum hava fingið serlig skaparevni.

Men í dag kann ein og hvør kalla seg listarfólk. Onkur heldur enntá, at alt, sum skapað verður, er list. Gamani, men samstundis dregur hetta listina niður av tindunum. Um øll eru listarfólk og alt er list, hvat er so list? Eyðkennið er júst, at hon skarar framúr. Vit kunnu øll gerast bergtikin av eini yrking, málningi ella sjónleiki. Vit undrast og ásanna, at hetta høvdu bert fá megnað at gjørt og staðfesta tí, at talan er um list. Heitið listarfólk er eftir mínum tykki eitt heiti, sum onnur eiga at geva einum. Ein yrking, bók, málningur, eitt lag, ein sjónleikur osfr. eru alt avrik, sum venda sær til onnur at gera sína meting um. Yrkjarin, sjónleikarin ella málarin sjálvur er ógegnigur at meta um sítt egna avrik. Tí ber tað í roynd og veru illa til at kalla seg sjálvan listarfólk; tað stendur til hini at avgera. Eins og tað illa ber til at kalla seg sjálvan kristnan, hóast flestu okkara brúka tað heitið um okkum sálvi. Hetta heitið er eins og heitið listarfólk ein æra, sum onnur krýna ein við, um ein livir upp til heitið. Øll kunnu kalla seg kristin, og í tí navninum er nógv ókristið framt, og harvið er heitið drigið niður á botn. Atferð, lív og avrik sýna, um talan er um ein kristnan – somuleiðis við listarfólkinum.

At so nógv í dagsins samfelag krýna síni egnu avrik sum list, kann minka um virðingina fyri listini. Tí list er nakað, sum virðing eigur at vera um. Og tá nú listin eisini verður misnýtt til politiska propagandaherferð, missir listin sum heiti sítt virði.

Nú frættist um øðrvísi mótmælisgongu, fyriskipað av listafólki. Vónandi fer hendan mótmælisgongan at virða listina og ikki misnýta hana til propagandaherferð. Eg havi stóra virðing fyri list og listafólkum, tí hesi fáa meg støðugt at undrast og fegnast um serligu evnini, sjálvur Skaparin hevur givið listafólkum. Allar Guðgivnar gávur kunnu nýtast til tað, sum gott er, men tær kunnu samstundis eisini misnýtast til annað enn tað, tær vóru givnar. Tí vil eg heita á øll listafólk um at halda virðingina fyri listini uppi.

Venda vit aftur til orðini hjá Ingálvi av Reyni, sála, kann aðalmálið hjá einumhvørjum myndlistafólki vera at mála EIN góðan málning – kanska tveir. Hjá skrivandi listafólki kann málið so samsvarandi vera at skriva EINA góða yrking ella bók.

*bill@leita.fo*

veitst tú ikki tað?
Sosialurin